# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hermenninir hava goldið tann hægsta prísin fyri teirra lut í arbeiðinum at hjálpa Afghanistan*

*Søren Gade, verjumálaráðharri*

# Her vórðu tvey børn myrd

**Tann 23 ára gamla mamman og børnini, sum vóru tvey og fýra ár, vórðu funnin illa særd í einum húsum í svenska býnum Arboga í gjárkvøldið. Børnini doyðu seinni**

Tað var stutt fyri klokkan níggju í gjárkvøldið, at ein kenningur fann kvinnuna og børnini illa særd í húsum teirra í Arboga stutt vestan fyri Stockholm. Maðurin ringdi alt fyri eitt eftir løgreglu og sjúkrabili, og hóast øll trý komu undir læknahond beinanvegin, doyðu tey bæði børnini løtu seinni.

Svenska løgreglan sigur, at álopsmaðurin hevði brúkt knív.

Seint í gjárkvøldið tók løgreglan ein mann. Hann hevur livað saman við kvinnuni fyrr og er pápi at báðum børnum hennara. Løgreglan sigur, at hann hevur gjørt seg inn á kvinnuna fyrr, eftir at tey fóru hvør til sítt, og at hann er undir illgruna fyri at hava framt illgerðina í gjárkvøldið. Hann bleiv tikin í býnum Mottala, men hann noktar seg sekan, sigur løgreglan. Hon útihýsir tó ikki møguleikanum fyri, at tað kann hava verið ein annar maður, sum leyp á kvinnuna og børn hennara.

Tann 23 ára gamla kvinnan er illa særd, men er sum skilst ikki í lívsvanda, skrivar TT.



*Í hesum húsunum í Arboga vórðu mannan og børnini funnin illa særd*
*Mynd: Scanpix*

# Guvernørurin í New York er blindur

**David Paterson skrivaði søgu, tá hann í gjár bleiv tikin í eið sum tann fyrsti svarti guvernørurin í New York. Harafturat er hann tann fyrsti blindi guvernørurin í USA**



*Judith S. Kaye, dómari, tekur David Paterson í eið sum guvernørur í New York. Í miðjuni nýggja guvernørfrúan, Michelle Page Paterson*
*Mynd: Reuters*

David Paterson hevur verið varaguvernørur í New York, men tekur nú við sum guvernørur eftir Eliot Spitzer, sum noyddist at leggja frá sær í síðstu viku, eftir at tað var komið fram, at hann hevði goldið einari skøkju av tí betra slagnum næstan 400.000 krónur fyri ymsar tænastur.

David Paterson kemur í amerikonsku søgubøkurnar. Í fyrra lagi tí hann er tann fyrsti svarti guvernørurin í New York, og í øðrum lagi er hann tann fyrsti blindi guvernørurin í USA, sigur CNN. Sum skilst er David Paterson ikki starblindur, men hann sær næstan einki. Hann varð dúgliga fagnaður eftir innsetanina í gjár.

Eins og Eliot Spitzer er tann 53 ára gamli David Paterson trúgvur stuðul hjá Hillary Clinton, sum umboðar New York í Senatinum, og tað er eingin ivi um, hvar hann fer at seta sín kross, tá hann sum guvernørur fer at atkvøða á uppstillingarfundinum hjá demokratunum seinni í ár.

Hillary Clinton var eisini hjástødd undir innsetanini í gjár saman við borgarstjóranum í New York, Michael Bloomberg. Eliot Spitzer var harafturímóti ikki at síggja, sigur CNN.

## STUTT SAGT

### Jøklar minka skjótt

Ein ST-kanning, sum umfatar 30 jøklar kring heimin, vísir týðiliga, at jøklarnir minka stjótt, og at teir eru ongantíð minkaðir so skjótt sum í 2006, tá kanningin bleiv gjørd. Í einari frágreiðing skriva tey, sum hava gjørt kanningina, at ein jøkul í Noregi var tann, sum minkaði mest í 2006, og at Echaurren-jøkulin í Kili var tann einasti av øllum 30, sum vaks. Kanningarfólkini siga, at gongdin kann fáa serliga stórar avleiðingar í India, tí vatnið úr jøklunum í Himmalaya hevur so stóran týdning fyri landið og tess búskap. Tað sama er í USA, har vatnið úr jøklunum í Rocky Mountains og Sierra Nevada hevur stóran týdning.

### Fór frá av spreinging

Verjumálaráðharrin í Albania, Fatmir Mediu, hevur sagt seg úr embætinum orsakað av teirri ógvusligu spreingingini á einari lóðurgoymslu uttan fyri høvuðsstaðin Tirana um vikuskiftið. Spreingingin kostaði minst 11 mannalív, og næstan 300 fólk fingu skaða. Fatmir Mediu er úr Tjóðarflokkinum, sum er í samgongu við konservativa flokkin hjá Sali Berisha, forsætisráðharra. Mediu hevur verið verjumálaráðharri í Albania síðani 2005.

### Selir slottið

Fyrrverandi franski forsetin Valery Giscard d'Estaing hevur lýst sítt slott til sølu. Fyrrverandi forsetin eigur eitt slott í Auvergne. Tað eitur La Varvasse og hevur 23 rúm. Umframt sjálvt slottið eru 15 hektarar av jørð við í søluni. Tað er ikki greitt, hvat tann 82 ára gamli Giscard ætlar at fáa fyri slott sítt, og meklarin, sum hevur lýst tað til sølu, hevur heldur ikki upplýst nakran prís, skrivar AFP.